## Niklái – ikki Maria!

Niklái Petersen, skipari úr Kollafirði, er uppstillaður fyri Tjóðveldi til løgtingsvalið 2008. Ikki Maria Kristiansdóttir, sum tað tað annars hevur staðið á onkrum lista, millum annað prentaður her í blaðnum. Maria Kristiansdóttir varð uppstillað til fólkatingsvalið í fjør, men er ikki uppstillað til løgtingsvalið í ár.



## Krill á Suðuroyarbanka

Krill, ella ljósæti, eru smá krabbadjór, sum minna nógv um rækjur, men eru nakað minni. Sambært Fiskirannsóknarstovuni eru serliga tvey ymisk sløg av ljósæti í føroyskum sjógvi. Annað kallast Thysanoessa longicaudata og er umleið 1 til 1½ cm til longdar, og hitt slagið Meganyctiphanes norvegica er nakað størri og kann blíva upp í 4 cm langt. Ljósæti svimur í sjónum og finst bæði á djúpum sjógvi og uppi undir vatnskorpuni. Ljósæti er týdningarmikil føði hjá fleiri fiskasløgum, eitt nú svartkjafti, makreli og upsa, umframt hjá barduhvali og fugli.

# Føroyskur fiskiskapur ikki burðardyggur

**Fiskiskapurin á føroyska landgrunninum er ikki burðardyggur. Ringast stendur til við toskastovninum, sum minkar ár um ár og er nú minni enn nakrantíð. Myndugleikarnir bróta bæði lógina um vinnuligan fiskiskap og altjóða definitiónir um burðardygga menning, heldur leiðari á Fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni**

UMHVØRVI

*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*- Toskastovnurin á landgrunninum er nú minni enn nakrantíð, og tað stendur púra greitt, at toskaveiðan er langt frá burðardygg. Harvið fylgir man ikki lógini um vinnuligan fiskiskap, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur og leiðari á Fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni*

Føroyar bróta hvønn tann einasta dag lógina um vinnuligan fiskiskap, ið er grundarsteinurin undir allari fiskiveiðu í føroyskum øki. Henda lóg ásetir í grein-2, at dentur skal leggjast á at varðveita tilfeingið, og at troyta og gagnnýta tilfeingið burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra og plantustovnarnir í havinum og mangi teirra (tvs hvussu nógv er til av teimum). Hetta til tess at tryggja besta samfelagsliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.

Orðingin í lógini um vinnuligan fiskiskap leggur seg harvið tætt upp at altjóða definitiónum um burðardygga menning og veiðu. Eitt nú definerar Bruntland-rapportin, at burðardygg menning skal lúka tørvin hjá verandi ættarliðum, uttan at seta í vanda tørvin hjá komandi ættarliðum. Og tá metast skal um burðardygga menning, skulu bæði búskaparlig, sosial og umhvørvislig viðurskifti takast við.

- Endamálið í lógini um vinnuligan fiskiskap er í tráð við altjóða definitiónir av burðardyggari menning, staðfestir Jákup Reinert, fiskifrøðingur og leiðari á Fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni.

Men endamálið í lógini og praktiski veruleikin ganga syngja sum nevnt ikki sama lag.

### Toskur í kreppu

Serliga er tað hvat toskastovninum viðvíkur, at tað lekur millum teori og praksis.

- Tað stendur púra greitt, at toskaveiðan er langt frá burðardygg, og harvið fylgir man ikki lógini um vinnuligan fiskiskap, sigur Jákup Reinert.

Hansara døpru staðfestingar byggja á fleiri ára royndir á økinum, umframt stovnsmetingar. Harav tær nýggjastu eru frá mai í ár.

- Toskastovnurin á landgrunninum er minkaður fleiri ár á rað, og er nú minni enn nakrantíð áður. Ringastu kreppuárini varð stovnurin mettur til 21.000 tons, nú ljóðar metingin 19.000 tons., sigur Jákup Reinert.

Eisini toskurin á Føroya Banka, ið verður mettur sum ein stovnur fyri seg, er sera illa fyri.

- Kanningar staðfesta, at toskurin á Føroya Banka er minst líka illa fyri sum toskurin á landgrunninum, sigur Jákup Reinert.

Grundreglan í allari fiskifrøði er, at ein fiskastovnur má ongantíð fara niður um eina ávísa støðd, tí so klárar hann ikki at endurnýggja seg. Og fyri at tryggja stovnin má veiðutrýstið ikki vera meira enn eitt vist. Annars er veiðan ikki burðardygg. Hvat toskastovninum viðvíkur, bæði á landgrunninum og Føroya Banka, er veiðan í løtuni ikki burðardygg, staðfestir leiðarin á Fiskideildini á Fiskirannsóknars tovuni.

Nógv onnur fiskasløg undir Føroyum, serliga á djúpum vatni, eru eisini hótt. Eitt nú kongafiskur, blálonga, svartkalvi, umframt fleiri onnur fiskasløg.

- Her kunnu vit staðfesta, at veiðitølini eru á søguliga lágum støði. Og tí hevur veiðan neyvan verið burðardygg í nógv ár, heldur Jákup Reinert.

Fiskifrøðingurin og leiðarin á Fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni vísir á, at reelt er eingin regulering av fiskiskapinum hjá djúpvatnstrolarunum. Tað einasta, ið er gjørt, er at dagatalið er fastlæst, umframt at ávísar leiðir eru stongdar fyri trolfiskiskap.

- Men venda vit aftur til toskin, so verður umleið 60 prosent av toskinum veidd við húki, og á Føroya Banka verður at kalla allur toskur veiddur við húki. Og ongar leiðir stongdar fyri fiskiskap við húki, undantikið gýtingarleiðirnr hjá toski, sum eru friðaðar í gýtingartíðini, sigur Jákup Reinert.

At kalla einastu glottarnir í fiskiskapinum eru hýsan og upsin, sum í løtuni eru hampiliga væl fyri. Serliga hýsustovnurin er væl fyri, og tískil verður hýsan veidd burðardygg. Men fiskifrøðingurin hómar ein vanda fyri upsastovninum, tí veiðan økist støðugt meira. Men av tí at stovnurin er væl fyri, er eisini veiðan eftir upsa framvegis burðardygg.

### Fylgja ikki tilmælum

Greiða niðurstøðan hjá Jákup Reinert er, at skipaflotin er alt ov stórur, og dagatalið á landgrunninum er alt ov høgt. Hann hevur tó ringt at seta neyvt tal á, hvussu nógv flotin átti at verið minkaður, tí flotin er samansettur av nógvum og ymiskum eindum.

Hvat dagatalinum viðvíkir, staðfestir leiðarin á Fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni, at politikararnir hava valt ikki at lurta eftir serfrøðini, eftir fiskifrøðingunum.

- Veiðan eftir toski hevur í nógv ár verið alt ov stór. Sammett við okkara tilmæli hevur talið av fiskidøgum í meðal verið eini 30 prosent ov høgt fleiri ár. Einstøk ár hevur dagatalið verið eini 50 prosent ov høgt, men yvir longri tíðarskeið er dagatalið eini 30 prosent ov høgt, sigur Jákup Reinert.

Í síni nýggjastu frágreiðing mælir ICES til at toskafiskiskapurin verður steðgaður heilt. So langt fór Fiskirannsóknarstovna tó ikki í sínum tilmæli.

- Vit staðfestu, at hýsan og upsin eru væl fyri, og tí mæltu vit ikki til at steðga toskafiskiskapinum heilt. Sjálvt um tilgongdin til toskastovnin leingi hevur verið undir miðal, so nakað sett til. Tí er avbjóðingin at tryggja, at tað, sum verður sett til, verður vart. Tað vil siga at tú verjir innaru økini, har toskurin veskur upp. Tá kann toskastovnurin so við og við vaksa aftur, sigur Jákup Reinert, men staðfestir í sama viðfangi:

- Tað ger man jú absolut ikki. Í dag fiska vit tann toskin, sum átti at fingið frið til at vaksa, so vit hava okkurt at veiða komandi árini.

Fiskirannsóknarstovan mælir í sínum áliti fyri 2007 til at dagatalið hjá skipabólkunum, sum fiska tosk og hýsu, verður skert 40%. Tá avtornaði bleiv skerjingin 1-2%.

Afturat lívfrøðiligu argumentunum eru eisini tey búskaparligu:

- Búskaparliga er avleiðingin kanska ikki so stór her og nú, tí toskaprísurin er sera høgur í løtuni. Men hetta kann gerast ein trupulleiki. Føroyar fáa trupult við at greiða umheiminum frá, hví vit ikki veiða okkara fisk burðardygt. Avleiðingin kann vera, at altjóða keyparar ikki vilja hava okkara fisk, sigur Jákup Reinert, leiðari á Fiskideildini á Fiskirannsóknarstovuni.

Sosialurin og Rás2 seta fokus á náttúru- og umhvørvismál. Í Sosialinum síðstu dagarnar hava vit umrøtt ymisk viðurskifti á økinum, og í kvøld klokkan 1930 verða náttúru- og umhvørvismál evni á politiskum Trapputingi í Miðlahúsinum. Trapputingið, ið verður skipað í samstarvi við Lívfrøðingafelagið, verður sent beinleiðis á Rás2